## Ferðalagið mannað

**Sandoy:** Eftir aðalfundin í gjár fer nevndin í Sandoyar Sýslu Ferðalag at skipa seg í næstum. Í nývaldu nevndini sita Kristvør Kolden, Laura Joensen, Kristina Petersen, Elna Skylv Hansen og Ida Lón.

## Kvinnur kring allan heimin savnast í bøn

Komandi fríggjadag verður hildin altjóða bønardagur fyri kvinnur. Í Føroyum verður tiltakið á trimum støðum. Hesin bønardagurin hevur mong ár á baki, og hevur savnað kvinnur úr nógvum saman í bøn. Og soleiðis verður eisini í ár. Fríggjadagin í næstu viku verður sostatt høvið hjá hesum kvinnum at savnast á trimum støðum kl. 19:30 – í Filadelfia í Havn, í Frelsunarherinum í Vági og í Emmaus í Klaksvík. Umframt andaliga felagsskapin og bønarhaldið, verður altíð savnað inn til eitthvørt endamál. Í ár verður høvið hjá kvinnunum at savna pening inn til trý endamál: Eitt skeið fyri 99 kvinnur í afrikanska landinum Liberia, arbeiðið í grønlendsku Fríkirkjuni í Nuuk og til kristilig arbeiðir í Litauen, Ukraine og í afrikanska landinum Malawi. Ein fastur prosentpartur fer til heimsrørsluna fyri einum altjóða bønardegi. Tað eru kvinnur í Suðuramerikanska landinum Guyana, sum hava gjørt teir serstøku bønartekstirnar til henda dagin. Evnið í ár er »Guds vísdómur gevur nýtt innlit«.

# Nógvir alarar á ráðstevnu

**- Eg eri stak væl nøgdur við aliráðstevnuna hesaferð, sum var hin triðja í røðini. Hetta er størsta undirtøka, sum nøkur stevna av slíkum slagi hevur fingið í Føroyum, sigur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríggjadagin skipaði Føroya Havbúnaðarfelag fyri aliráðstevnu á Hotel Føroyum. Hetta var triðja stevnan í røðini, og stevnan hesaferð fekk so dygga undirtøku millum alarar, sum ongantíð áður.

Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag og stjóri í Marine Harvest, sigur, at á fyrstu ráðstevnuni, sum felagið skipaði fyri, vóru eini 70-80 luttakarar. Í fjør vóru 150, og á stevnuni hesaferð var luttakaratalið heili 180.

Tað gleðir ikki formannin minst, at millum luttakararnar hesaferð vóru eini 100 fólk beinleiðis úr føroysku alivinnuni, harav fleiri røktarar vóru við.

- Fleiri slíkar ráðstevnur eru uttanlands, eitt nú í Noregi, men í slíkum føri er vanligt, at stjórar og kanska onkur rakstrarleiðari fer avstað. Fyrimunurin við eini slíkari stevnu her heima, er, at tað er nógv bíligari fyri feløgini at lata fólk luttaka, og soleiðis fáa eisini fleiri nakað burtur úr.

Aliráðstevnan hesaferð setti serliga fokus á, hvussu alivinnan kann optimalisera framleiðsluna av laksi fram til tøku. Fyrilestrar vórðu hildnir um eitt nú marknaðarútlit fyri alivinnuna, innlitingarstrategiir og hagreiðing av laksi í sambandi við tøku. Eisini vóru fyrilestrar um lívfrøðiligu gongdina í føroysku alivinnuni seinasta árið, um kanningarnar, ið eru gjørdar av ILA í Føroyum og royndirnar við toskaaling í Føroyum higartil.

### Gott 2007

Ragnar Joensen sigur, at eingin felags niðurstøða varð gjørd á aliráðstevnuni, men hvør einstakur fyrilestrarhaldari kom við síni niðurstøðu á sínum øki.

Hann sigur, at fastur táttur á hesum ráðstevnum er at líta aftur yvir – og hyggja frameftir.

- Lívfrøðiliga sæð eydnaðist árið í fjør stak væl, um enn ikki eins væl og árið fyri, sum var fram úr.

Ragnar sigur, at tá ið tosað verður um lívfrøðiligu gongdina, verður eitt nú hugt at felli og vøkstri, og hvussu nógvur fiskur fæst burtur úr tí fóðri, sum brúkt verður í alingini.

- Í Noregi eru vøksturin ikki heilt so góður, sum tey hava roknað við, og í Chili gongur heldur ikki so væl, sum tey kundu ynskt sær. Tí eru marknaðarútlitini hampilig, heldur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag.



*- Fyrimunurin við eini slíkari ráðstevnu í Føroyum er, at tað er nógv bíligari fyri feløgini at lata fólk luttaka, og soleiðis fáa eisini fleiri nakað burtur úr, sigur Ragnar Joensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Útlitini fyri laks

Á ráðstevnuni legði Hans Jákup Mikkelsen, Marine Harvest, fram gongdina á marknaðinum seinastu árini og framtíðarvánirnar.

- Prísurin á laksi svingar sera nógv. Í 2000 var ein toppur, har miðalprísurin lá um umleið 34 krónur fyri kilo, og í 2006 var laksaprísurin upp ímóti teimum 40 krónunum fyri kilo. Árini millum 2000 og 2006 vóru sera tung hjá alivinnuni, har prísurin í longri tíðarskeið lá niðanfyri 20 krónur fyri kilo. Síðan 2006 er laksaprísurin aftur fallin, og liggur hann nú á umleið 23-24 krónur fyri kilo.

Hans Jákup sigur, at sera torført er at meta u, hvussu eftirspurningurin eftir laksi fer at laga seg næstu árini, men metingar siga tó, at eftirspurningurin helst fer at fella nakað í mun til seinasta ár.

- Mett verður, at alheims eftirspurningurin fer at veksa umleið 7%, og verður bert hugt eftir Evropa, verður roknað við, at eftirspurningurin fer at veksa umleið 7% í 2008.

Hans Jákup Mikkelsen segði, at útboðið av laksi á evropeiska marknaðinum helst fer at veksa eini 19%, meðan alheimsútboðið helst veksur eini 11%.

# Oljan – hóttir sum eitt djúpt lágtrýst

**- Skeiva gongdin í fiskivinnuni hevur við sær, at møguleikarnir fyri øktum inntøkum minka, samstundis sum útreiðslurnar veksa, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Føroya Reiðarafelag hevur Viberg Sørensen grein við heitinum: “Við verandi gongd – hvar eru vit í 2015?”

Í greinini vísir hann á úttalilsir hjá stjórunum í Maru Seafood, Faroe Seafood og stjóranum í Vinnuni í Gøtu.

- Maru Seafood hevði stórt hall í fjør (men stjórin vil ikki siga hvussu stórt), og Faroe Seafood hevur 17 miljónir krónur í halli. Stjórin í Vinnuni í Gøtu væntar, at svartkjaftakvotan helst fer at minka so nógv, at ikki verður ráðiligt at gera stórar íløgur í svartkjaftavinnuna.

Viberg Sørensen sigur, at hetta eru nøkur av signalunum, sum vit hava fingið seinastu tíðina.

- Tá ið reknskapirnir fyri tey stóru skipini á Føroyagrunninum fara at koma, verða eyðvitað nógv stór reyð tøl at síggja á botnlinjuni.

Hann vísir á, at í dag kostar ein litur av olju einar 5 krónur, og hetta er størsta hóttanin hjá skipaflotanum.

- Teir, sum fáast við skiparakstur, síggja nú tíðiliga skriftina á vegginum - og hvønn veg tað ber.

Einki talar fyri, at oljan ikki heldur fram at dýrka. Vit hava hoyrt serfrøðingar nevna tøl upp ímóti 200 dollarum fyri tunnuna. Nógv hevur tosað um “visjón 2015”, men hvat man oljan fara at kosta í 2015, spyr hann.

Viberg Sørensen sigur, at føroyingar eru nógv upptiknir av at fylgja við veðrinum. Tá lágtrýstini nærkast, er gott at vita, hvussu tey ganga, og hvussu djúp tey verða. Vit fáa forsagnir og kunnu so vera til reiðar, tá ringa veðrið kemur.

- Um vit ímynda okkum, at oljuprísurin verður 8 krónur fyri liturin - ella meira - hvat gera vit tá? Hava vit gjørt okkum nakrar hugsanir um, hvussu fiskiveiðan á landi og sjónum sær út um fá ár - ella lata vit bara standa til og vóna tað besta? spyr formaðurin í Føroya Reiðarafelag.



*- Hvat gera vit, um oljan kemur upp á 8 krónur fyri liturin ella meira, spyr Viberg Sørensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*